# um Árnasavnið



*Tá Deild 1 læt upp fyri 40 árum síðani var talan um eina nýmótans deild við øllum teim tilboðum, sum vóru neyðug fyri røktina av teimum sinnisveiku. Millum tey fyrstu átta starvsfólkini vóru hesar fýra: Petry Olsen, Marin Samuelsen, Tordis Johannesen og Margreth á Rógvu Niclasen*

annað til røktina sett á rætta pláss á deildini, so hvørt sum rúmini og stovurnar vóru klár til tess.

– Hetta gekk sera væl, ikki minst tí at vit høvdu góða tíð at skipa alt so væl sum til bar, greiða tær fýra ídnar frá.

Hinvegin var ikki líkt til, at handverkararnir og leiðslan vóru av somu sannføring. Dagurin fyri upplatingini varð fluttur fram nakrar ferðir, men sohvørt sum vikurnar gingu, tóktist tað sum um panikkur av og á hómaðist í monnum. Tað var ikki frítt, at starvfólkini av og á hoyrdu teir físa eftir hvørjum øðrum, tí okkurt ikki gekk eftir ætlan ella var ov seint liðugt.

Í aðrar mátar komu handverkararnir og tær ungu sjúkrasystrarnar væl út av tí hvør við annan - og hví skuldu tey ikki tað: Damurnar gingu jú við kappa og í hvítum og lærstuttum kitlum, so ein kann bara ímynda sær, at teir hava hugt nógv eftir teimum.

– Ja, vit vóru bæði ungar og penar, skal eg siga tær. Kanska var tað orsøkin til, at teirra arbeiði ikki altíð gekk so skjótt!, sigur ein av snakksaligu sjúkrasystrunum, meðan hinar skera í ein látur.

## Hatta klára tit!

Tey fyrstu røktarstarvsfólkini vóru kortini ikki bert til arbeiðis á deildini. Arbeiðsdagurin byrjaði við tí, sum tær fýra nevna "andaligari føði" - tað er: undirvísing í psykiatri.

Hetta hendi í samband við morgunfundin á læknagongini, har tey fingu dagført vitan sína um sálarsjúkur, viðgerð av teimum, og um hvussu ein ímyndaði sær, at ein slík deild skuldi kunna virka á føroyskari jørð.

– Sálin í hesum var Árni Olsen, sum var ein fantastisk persónsmenska og framúr góður menniskjakennari og góður við okkum starvsfólk, eru tær fullsamdar um. Hann var í byrjanini einsamallur lækni á Statshospitalinum, sum tað tá æt.

Tá Árni Olsen, yvirlækni, hevði undirvíst, fóru tey beinleiðis oman á deildina, har alt arbeiðið varð skipað undir kønari hond av frú Brandt, sum var yvirsjúkrasystir teirra. Henni hava tær fýra bara gott at bera. Ja, tær beskriva hana nærum sum ein eingil at arbeiða undir.

– Frú Brandt dugdi sera væl at leiða arbeiðið: Hon var bæði mild og góð, og dugdi ótrúliga væl at fáa alt tað positiva fram í okkum. Hon segði ofta við okkum: "Hatta klára tit sum einki", og soleiðis gekk tað bara frameftir dag fyri dag.

- Eg minnist einki til, at vit merktu til stress av nøkrum sum helst slagi. Ja, eg haldi faktiskt ikki at orðið "stress" var uppfunnið tá, sigur Marin við einum brosi.

Soleiðis gingu dagarnar, og so smátt varð dagurin umsíðir ásettur, nær fyrsta psykiatriska deildin skuldi lata upp. Men eitt var øll tann praktiska og fakliga fyrireikingin og upplatingin. Hvussu var við sjúklingunum? Hvaðani komu tey fyrstu?

## Innlegging og útskriving

Á hesi fyrstu psykiatrisku deildini, sum í dag ber navnið Deild 1, var pláss fyri 20 sjúklingum. Greitt varð frammanundan, at eingin sjúklingur skuldi vera á deildini, tá sjálv upplatingin fór fram mikudagin 29. oktober fyri júst 40 árum síðani.

Sjúkrasystrarnar og pleygararnir høvdu úr at gera við at fyrireika móttøkuna av fyrstu sjúklingunum sum komu á deildina dagin eftir.

– Men vit vistu ikki reiðiliga hvørji hesi vóru, minnast tær fýra afturá.

Tær vistu tó, at í fyrsta umfari var talan um fýra sinnisveik fólk, sum lógu á Landssjúkrahúsinum. Her bíðaðu tey bert eftir, at deildin, sum var gjørd til teirra tørv, skuldi lata upp. Sohvørt vórðu fleiri og fleiri sjúklingar innlagdir, samstundis sum aðrir kundu útskrivast eftir lokna viðgerð.

Tað var tó ikki bert í Føroyum at føroyingar bíðaðu eftir hesi deildini. Á donskum sjúkrahúsi - Sindsygehospitalet í Nykøbing Sjæl-

*Framhald á næstu síðu*